

MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýføddа barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


# Uppboðssøla á alnetinum

**Loppan.fo er nýggja føroyska uppboðssølan á alnetinum, har alt kann seljast og keypast**




Loppan.fo er ein pallur hjá privatum seljarum og keyparum og er púra ókeypis at nýta. Loppan hevur allar hugsandi møguleikar og er ein komandi hornasteinur í føroyskari sølu og keypi á alnetinum.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at fyrimunir við at selja á Loppuni eru t.d. at brúkarin kann seta vørur til sølu og fylgja við søluni heimanífrá, lýsa vøruna við myndum og teksti og áseta ein minstaprís á vøruna og tryggja tær, at hon verður seld fyri ein ávísan prís.

Fyrimunir við at keypa eru at alt kann keypast á loppan.fo. Brúkarin kann eftirlýsa vørur, ið hann ella hon mangla og t.d. seta spurningar til seljaran, áðrenn bjóðað verður. Skipanin boðar eisini frá, um onkur annar bjóðar meira.

Tey sum skráseta teg sum brúkara á loppan.fo eru við í lutakastinum um ein 42" Panasonic plasma flatskerm. Tað er eisini ókeypis, og vinnarin verður kunngjørdur fríggjadagin 28. desember 2007 kl. 17 á heimasíðuni, og skermurin kann heintast í Expert sama dag.

Tað er Sp/f Drainsoft, ið eigur og rekur uppboðssøluna. Sp/f Drainsoft hevur síðan 1997 forritað og ment kt-loysnir, harímillum forrit, spøl og heimasíðuloysnir fyri virkir.

# Lydia og Gull-Britt í Ribarhús

Fra 10. desember og mánaðan út, hava klaksvíkskvinnurnar Gull-Britt Hansen og Lydia Petersen framsýning í Gallarí Ribarhús.

Tær hava báðar málað í mong ár og verið við til nógvar framsýningar saman við øðrum, eisini hava tær haft sjálvstøðugar framsýningar. Í november vóru tær fyrstu ferð saman um eina framsýning í Smiðjuni Lítluvík.

Gull-Britt og Lydia eru sera ymiskar, Gull-Britt málar landsløg og hugnaligar fólkalívsmyndir, meðan Lydia málar litríkar hálvabstrakar myndir.

Framsýningin er opin mánd.-fríggjad. kl. 15-17.30 og leygard. kl. 11-13.



*Lydia Petersen og Gull-Britt Hansen*

# Framsýningar og jólasøla í Gallarí Ribarhúsi

Jólamánaðin er nógvur aktivitetur í Ribarhúsi og Piddasahandli í Fuglafirði.

Ein framsýning hjá Heðini Kambsdal var frá 4. til 9. desember, og í løtuni er ein bókasøla hjá missiónshúsinum Thabor, sum verður opin til 15. desember. Frá 10. til 31. desember verður ein framsýning hjá listakvinnunum Lydiu Petersen og Gull-Britt Hansen úr Klaksvík.

Umframt framsýningarnar er handiliná tremur við jólagávuhugskotum sum t.d. heimavirkaðum prýðisog brúkslutum - alt frá fjálgum pløggum til fløgur og súltutoy.

Eisini er kaffi, kakao ella cappucino at fáa við onkrum góðum afturvið.

Jólasølan heldur fram til jóla. Opið er hvønn dag frá kl. 15, tó leygardag frá kl. 11. Í jólavikuni verður longur opið.

Les meira á: www.ribarhus.com.




